## DAGSINS MEINING

# Kapping um lýsingar – eitt mál fyri Kappingarráðið

Tað er eitt áhugavert mál, ið Jógvan á Lakjuni og Finnur Helmsdal hava reist í løgtinginum, har spurningurin verður settur við, hvørt tað er rætt, at Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya skulu sleppa at kappast við privatu miðlarnar um handilslýsingar, samstundis sum almennu loftmiðlarnir verða stuðlaðir við almennum pengum, kravdir inn sum hyggjara- og lurtaragjald.

Nú hevur rættuliga nógv verið fokuserað upp á, at mismunur verður gjørdur millum ÚF og SvF mótvegis Rás 2. Tað er sjálvandi rætt, at mismunur verður gjørdur, men lítið hevur verið tosað um tann mismun, ið er millum almennu miðlarnar og bløðini. Vit hava í dag tvey stór dagbløð í Føroyum, Sosialin og Dimmalætting, ið verða rikin fult og heilt eftir handilsligum prinsippum.

Tað er einki dulsmál, at mismunurin millum ÚF og SvF mótvegis Sosiali og Dimmu er vaksin seinnu tíðina. Almennu loftmiðlarnir fingu fyri nøkurm árum síðani loyvi at kappast við privatu bløðini um handils- og vanligar tilboðslýsingar. Síðani hendi tað, at Postverk Føroya setti prísin fyri útbering av bløðum so nógv upp, tí hetta skuldi verða »á handilsligum grundarlag«. Postverkið skuldi ongar útreiðslur hava av at bera út bløðini. Vit kunnu vera ymisk á máli um, hvørt tað er rætt, at Postverkið (les tað almenna) skal stuðla bløðunum, men hetta merkir tó, at prísurin fyri útbering er bæði tví- og sumstaðini trífaldaður. Hetta eru útreiðslur, sum bløðini hvør í sær megu klára at gjalda sjálv. Aðrastaðni letur tað almenna stuðul til postverkini, ið er oyramerktur til útbering. Eisini hendi tað, at postverkið gavst við at bera týdningarmesta blaðið út í vikuskiftinum.

Vit kunnu altíð kjakast um, hvør miðil hevur størstan samfelagsligan týdning, útvarp, sjónvarp ella bløðini. Men at brúk er fyri øllum, man eingin ivi verða um, og at framleiðslukostnaðurin av tilfari hjá ymsu miðlunum er ymiskur, er heldur einki dulsmál. Men skuldu Dimmalætting og Sosialurin havt somu sømdir, sum ÚF og SvF, hevði tað svarað til, at hvørt húsarhald við lóg varð pliktað til at halda bæði bløðini. Hetta hevði tvífaldað upplagið hjá bløðunum, og tá varð lagað manni at skriva bløð. Men ikki nóg mikið við tí. Um treytirnar vóru tær somu, so skuldu bløðini einki goldið postverkinum fyri útbreiðsluna – aftur ein útreiðsluminking í milliónaklassanum.

Føroyar er einasta norðurland, sum hevur tann politikk, at bløðini skulu klára seg sjálv – einasta land, har bløðini fáa 0 krónur í stuðuli. Um hetta er rætt, ella um hetta ikki er rætt, kunnu vit vera ymisk á máli um. Men nú so stórur týdningur verður lagdur í, um nú kapping er á jøvnum føti, er júst kappingin millum almentfíggjaðu miðlarnar og teir privatu um handilslýsingar upplagt mál hjá Kappingarráðnum at tikið upp. Vit ganga annars inn fyri, at Føroyar eiga at hava eitt vælvirkandi útvarp og sjónvarp, og at hesi hava so stóran týdning fyri bæði mentan og samleika, at tey áttu at staðið á fíggjarlógina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lesandi uttanfyri norðanlond eru í peninganeyð

**Jákup Fróði Djurhuus**
*valevni sambandsfloksins í suðurstreymoy*



– Tey eru fá, men tey fáa ongar sømdir sum er. Her er onki samsvar ímillum politiskt hugflog og handalag.

Rokna verður við, at umleið 2000 føringar lesa uttanlands. Flestu lesa í Danmark, tí tað er ókeypis. Ein útbúgving á hægri støði kostar ímillum 500.000 og 1 mió kr.

So ein hópur uppá 2000 føroyingar kostar sostatt (teimum órættvísu?) ímillum 1 og 2 mia. í skúlagjaldi at fáa undan. Aftrat kemur lestrarstuðul, bústaður, barnaansing v.m.

Tær nýtist ikki at vera føddur við gulltonnum fyri at lesa. Børn hjá øllum vanligum føringum, dønum og grønlendingum hava grundlógartryggjaða atgongd á jøvnum føti við børn hjá teimum sum eru betri fyri fíggjarliga. Og soleiðis skal tað vera.

Síðani seinasta samgonga tók við, hevur verið ført fram av fleiri tinglimum, at tað eru ongir trupulleikar av at fara úr ríkisfelagsskapinum. Vit kunnu halda áfram at lesa sum nú. Og so hevur verið tosa um týdningin av at lesa uttanfyri norðanlond.

**Føroyingar betri fyri í Íslandi, enn teirra Ìslendsku skúlafelagar**

Norðurlendska avtalan fyri lesandi er munandi verri enn tann avtala vit hava í ríkisfelagsskapinum. Norðurlendska avtalan kann til eina og hvørja tíð broytast. Har skalt tú t.d hava lestrarstuðul (SU) við tær úr heimlandinum

Okkara núverandi avtala er grundlógartryggja. Vit hava somu rættindi til at lesa í Danmark sum danir og Grønlendingar, soleingi vit ikki eisini "avhenda hetta skeytið".

Eitt nú Íslendingar sum lesa í Danmark, fáa ongan stuðul til lesna heimanífrá, meðan føringar, sum lesa í Íslandi, fáa SU úr Danmark.Føringar í Ìslandi eru sostatt nógv betri fyri fíggjarliga enn teir íslendingar teir ganga í skúla samanvið í Reykjavík.

**Lestur í Onglandi**

Nøkur hava "bitið á " og eru farin undir víðari lesna eitt nú í Onglandi. Men teirra umstøður at lesa eru sera vánaligir.

Fyri einsatakar útbúgvingar mugu tey gjalda ímillum 100 og 200 túsund krónur árliga bara at sleppa at ganga á skúlanum. Og tey fáa bara 60 túsund krónur frá Føroyska stuðulsstovninum. Hesin peningur er oyramerktar til sjálvt skúlagjaldið. Tað sum liggur omanfyri, mugu tey útvega sær á annan hátt. Tíbetur fáa tey einar 4.000 kr. um mánan frá SU í Danmark at liva fyri, og møguleika fyri at taka lestrarlán at liva fyri. Annars hevði verið reint galið.,

So her manglar nógvur peningur í til skúlagjald, íbúð og vanligan livikostna hvørt ár.

**Skulu oljufeløg peika lesandi út?**

Eitt oljufelag hevur boðið sær til at fíggja lesnaðin hjá 20 føringum á Robert Gordon universitetinum í Aberdeen. Alt gott um tað. Ì einum vælvirkandi samfelagi er hetta eitt kærkomið tilboð aftrat teimum tilboðum sum longu eru.

Men um peningatrot er í einum samfelagi, og hesin peningur verður sprændur inn ígjøgnum mikrobúskapin, so lúrir vandin, at tað verður tann sum letur, sum setir treytirnar, og sum í síðsta enda kann koma at detailstýra bæði politikarum og vinnulívi beinleiðis.

Sama kann gera seg galdandi, tá ið talan er um gransking. Lat hesa fyrstu Menasgranskingarætlanina vera dømi um hvussu man ikki skal bera seg at framyvir.

Soleingi samfelagið fær tilført pening ígjøgnum makrobúskapin,(ríkisveitingin úr Danmark), er vandin fyri detailstýring bara akademiskur (smbr tjakið um evstavald á ymsum økjum). So eitt kjak um hetta átti at ligið frammaliga í huganum hjá teimum (sosialt tilvitaðu?), sum leggja so stóran dent á evstavald, sum fyritreyt fyri øllum lívi her á foldum.

**Babbasa børn**

Hetta við at lesa ókeypis, er ein so nýggj skipan, at børnini hjá "teimum útvaldu" hava dominera umsiting og politikk fram til dagin í dag. Tó við nøkrum fáum undantøkum. Hygg at eftirnøvnunum, og samanber við sosialan status um tað mundi lisið var. Ikki fyrrenn nú, byrjar vanligi føroyingurin at sleppa framat. Og so eru røddir frammi um at fara burturaftur frá hesi skipan.

**Ókeypis skúlagongd**

Tað má vera eitt minstakrav, at tey fáu lesandi í tí samlaða høpinum, sum velja at lesa uttanfyri Norðanlond , nú ríkisfelagsskapurin ber nærum allan kostnaðin hjá teirri stóru fjøldini av lesandi, fáa sín skúlakostna goldnan av føroyska stuðulsstovninum. Soleiðis at tey sjálvi kunnu velja og vraka óheft av serligum áhugamálum.

Hetta má vera ein treyt, um almenni politikkurin er, at tað er neyðugt, at føroyingar skulu lesa uttanfyri ríkisfelagsskapin, og uttanfyri norðanlond.

Kemur man hinvegin til ta niðurstøðu, at góðskan á skúlanum innanfyri ríkisfelagsskapinum er á slíkum støði, at tað ikki er neyðugt at senda føringar burtur í onnur lond at lesa, er støðan sjálvandi ein onnur.

Sum støðan er í dag, er onki samsvar ímillum politiska hugflogið , og tær hendur sum skulu umsita og løggeva fyri einari solidariskari skipan, sum fylgir prinsippinum um, at føroyingar kunna lesa óansæð fíggjarliga førleikan hjá mammu og babba ,ella vælvild frá oljufeløgum.


Sosialurin

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Óbeinleiðis studningur í vinnulívinum

**Rói Egholm**

Politikarar breggja sær ofta av, at føroyska vinnan er vorðin sunnari, nú eingin studningur er í vinnuni.

Um Framtaksgrunnurin setur 50 mió í eitt virki uttan krav um avkast, so hevur tað somu ávirkan sum studningur ella eitt rentu- og avdráttarfrítt lán í ævigar tíðir.

Seinastu árini hevur kjakið um almennan pening í føroyska vinnulívinum verið frammi fleiri ferðir.

Serliga hevur verið kjakast um, um partapeningurin, sum Framtaksgrunnurin hevur sett í fiskivinnuna á landi, er kappingaravlagandi ella ikki.

Í blaðgrein fyri stuttum segði stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, at landið eigur uml. 2.500.000.000,00 kr. (2,5 mia.) í føroyska vinnulívinum og at almenna kravið til avkast var at siga 0,00 kr., burtursæð frá tí, sum landið fær í vinningsbýti av rakstrinum frá Føroya Banka.

Privatir kappingarneytar koma við tí sindri, sum uppspart er, og seta tað í feløg sum eginpening, og restin av fíggingartørvinum skal fáast til vegar úr peningastovni til høgar rentur og avgjøld.

Samanborið við tær áðurnevndu 2,5 mia. kr. av almenna peninginum í vinnuni, munar tann váðafúsi privati peningurin lítið.

**Føroyska uppsparingin**

Tað hevur verið frammi, at føroyingar eiga 8,5 mia. kr. á bók. Av hesum stendur uml. helvtin í føroysku peningastovnunum og hin helvtin í útlendskum stovnum.

Trupulleikin er bert, at størstu uppsparararnir eru stovnar og feløg. Eitt nú ALS, Starvsmannafelagið og arbeiðarafeløgini.

Tað má vera avmarkað, hvussu nógv av hesum 8,5 mia. kr. er váðafúsur kapitalur, sum er tøkur til vinnulívið. Spurningurin er eisini, um hesin peningur kann metast sum privatur.

Tað, sum vanligi føroyingurin eigur tøkt á bók til íløgur, er bert ein lítil partur av samlaðu føroysku uppsparingini, og tað er ikki so lætt at fáa hesa uppsparingina lagda í vinnulívið sum váðafúsan pening at kappast við tær almennu 2,5 mia. kr.

**Frælsið og planbúskapurin**

Tað er ein sannroynd, at tær almennu fyritøkurnar hjá Framtaksgrunninum (Føroya Fiskasøla og Føroya Fiskavirking) og Føroyagrunninum (Kósin) eru ónatúrliga sterkar fíggjarliga samanborið við restina av fiskivinnuni á landi.

Eg meti at hesar tríggjar fyritøkurnar hava uml. 65% av samlaðu eginognini hjá føroysku flakavirkjunum og føroysku fiskasølunum, meðan hini uml. 20 feløgini hava hini 35% av samlaðu eginognini.

Tað er sum so einki skeivt í tí at hava stórar fyritøkur í eini vinnugrein, men tað hevði verið nógv sunnari, um hesi feløg høvdu havt arbeitt seg upp til sínar serstøður í vinnuni.

Men hesar fyritøkur eru gróðursettar í vinnuni í krepputíðum, t.v.s. sum krepputoysnir, antin sum nýggjar fyritøkur ella virknar aftur eftir at hava verið koyrdar á húsagang.

Tað tykist løgið, at kreppuloysnir skulu stýra fiskivinnuni á landi, tá ið búskapurin annars blomstrar.

Tíðin má vera komin til, at hesar fyritøkur verða seldar til ta privatu vinnuna ella avtiknar, um so er, at eingin áhugi er fyri at keypa tær.

Politikarar og enntá einstakir vinnulívsmenn hava verið frammi og sagt, at Føroya Fiskasøla má halda fram, tí ein av fremstu uppgávum hennara er at fíggja framleiðsluna hjá nøkrum føroyskum virkjum og skipum.

Álvaratos, her tekur Fiskasølan á seg uppgávur, sum eru ein bankauppgáva og ikki eina søluuppgávu, sum jú er endamálið við virkseminum hjá fiskasølum. Tað er upp á tíðina, at føroyska bankakervið tekur sær av fíggjaruppgávunum hjá høvuðsvinnuni.

Fiskasølur eru til fyri at keypa og selja fiskaúrdráttir og ikki fyri at reka bankavirksemi hjá fiskivinnuni á sjógvi ella landi.

Tað, sum er óheppið, er kappingin ímillum almennan og privatan váðafúsan pening í vinnuni.

Tær smærru privatu fyritøkurnar hava trupult við at leggja ætlanir, tí ætlanir vera m.a. lagdar í mun til, hvussu kappingin lagar seg, men hesar almennu fyritøkurnar kunna koppast á við politiskari ávirkan sum púrt einki hevur við búskap at gera.

Í grundini átti eingin fyritøka at megnað at kappast ímóti hesum almennu fyritøkum, men eitt er teori og annað er veruleiki. Fyri eitt vinnulívsfólk er tað sera nøktandi og orkuskapandi at síggja eina fyritøku vaksa, sum tú hevur bygt upp ella sum tú á ein ella annan hátt hevur veruliga ávirkan á. Slík fyritøka verður ofta rikin øðrvísi enn ein almenn fyritøka/institutión, har nevndarlimir og stjórar ofta verða politiskt settir.

Tað er ikki nóg mikið, at almenni partapeningurin ikki hevur heitið studningur á pappírinum, tí hesin almenni partapeningur hevur somu ávirkan á vinnulívið sum studningur. At bøta um hetta ófrælsi í vinnuni er alneyðugt og átrokandi og hetta fáa vit bert, um almenni peningurin verður tikin úr vinnulívinum.

So leingi sum sparipeningurin hjá føroyingum ikki kann kappast í vinnulívinum uttan at møta máttmiklum almennum pengi, kann vinnulívið ikki kallast frælst og verður ikki so virkið, sum tað kundi verið.

Eitt frælst og virkið vinnulív skapar størsta virkisfýsnið og kastar mest av sær til arbeiðsfólkið, ánarar og í seinasta enda eisini til samfelagið.

**Førleikin í fólkinum skapar fortreytir fyri einum frælsum Føroyum**

Tey, sum arbeiða í fiskivinnuni á landi, eru av raskastu og dugnaligastu fólkum ein kann hugsa sær, líka av gólvinum og til ovastu leiðslurnar. Hetta er galdandi, sama um fyritøkan er privat ella almenn. Tey, sum arbeiða hjá Føroya Fiskavirking, Føroya Fiskasølu ella á Kósini hava hjartað líka nógv við í fyritøkuni, sum tey sum arbeiða í einari privatari fyritøku, men spurningurin er, um hetta arbeiðsaktivið ikki hevði skapt eitt størri avkast til samfelagið, um tey arbeiddu í einari frælsari vinnu við størri persónligari ávirkan, heldur enn undir politiskt ávirkaðum nevndum.

Arbeiðast skal fyri einum liberalum vinnulívi, har lógirnar og treytirnar eru eins fyri øll, og har bygnaðurin stendur á fólkarræðisligari grund. Tá eru fortreytirnar fyri búskapinum og trivnaðinum hjá tí einstaka bestar.

Eitt frælst vinnulív og ein frælsur borgari trívast best í einum frælsum landi. Eru allir føroyingar eins fyri lógini og kenna ábyrgd, so eru teir eisini fúsir at taka fulla ábyrgd.

# Um at gjalda kommunuskatt

**Heri Mohr**



Í hesum døgum verður nógv skrivað og tosað um kommunuskattin hjá landspolitikarum. Ósemja er um, hvat og í hvørjum kommunukassa skatturin skal enda.

Tað framgongur av tí, ið skrivað verður, at tveir úr Suðuroyar valdømi í Tórshavnar kommunu búgvandi løgtingsmenn ikki vilja gjalda kommunuskatt til nevndu kommunu, men heldur til kommununa í teirra valdømi. Havnar kommuna og løgtingsmenninir tykjast at standa hvør við sítt, og fara kanska at enda í rættinum.

**Er tað neyðugt at buldra so fjákut við tómum tunnum?**

Tað er einki nýtt í tí, at meginparturin av okkara landspolitikarum eru frá valdømum uttanfyri Havnar kommunu, og at tað meira enn so kemur fyri, at nakrir av teimum hava bústað/uppihald í tveimum kommunum. Slíkir grensuspurningar eiga sjálvandi at verða loystir við Salamonskum handalagi: Undirritaði er vitandi um, at í hálvtrýssunum og trýssunum varð kommunuskattur býttur í helvt, tá ið talan var um bústað og uppihald hjá landspolitikara í tveimum kommunum.

Slík “gentleman´s agreement” hevði óivað eisini nú kunnað borið til, um tann í Føroyum illa trevsaði harra Vitogskil slapp úr skammikrókinum og varð settur undir liðina á samráðingarmonnum frá avvarðandi kommunum.

# Til ungdómin í Klaksvík

**Jórun Høgnesen**
*forkvinna í Mentunarnevnd Klaksvíkar Býráðs*



Hoyrdi sum stórtíðindi niður til Danmarkar, at nú var ungdómurin í Klaksvík farin at gera vart við sína ónøgd, serliga tí onki diskotek er til teirra undir 18 ár.

Eg fekk eisini SMS-boð um at vera við á posthúshorninum, men var ikki har av góðum grundum, tí eg havi forfall í løtuni.

Annars hava fleiri ung nýtt høvi at tosa við meg í seinastuni um ungdómspolitikk, og tað dámar mær væl, tí tað er neyðugt við einum dialogi millum ungdómin og politikararnar.

Tit halda ivaleyst, at ov nógv verður tosað, og ov lítið gjørt, men tað hevur eisini eina frágreiðing, tí tað er nevniliga so, at alt arbeiði hjá kommununi verður gjørt eftir eini fíggjarætlan. Á fíggjarætlanini fyri 2001 vóru ongir pengar merktir beinleiðis til ungdómin, og tí kundi onki ítøkiligt gerast tað árið, uttan at leggja ætlanir og seta pengar á fíggjarætlanina fyri 2002. Hetta var fyrsta fíggjarætlan, ið sitandi býráð gjørdi.

Tað eydnaðist eisini at fáa pening settan av, og tí kann kommunan nú fara undir at arbeiða við ungdómsviðurskiftum og at seta ein ungdómsleiðara, sum saman við tykkum skal virka fyri at fáa eitt gott “ungdómshús” í Klaksvík. Mín vón og ætlan er, at ungdómshúsið skal koma skjótast gjørligt.

Ein møguleiki kundi verið at tit skipa tykkum í eitt felag, og síðani koma á tal við Býráðið undir skipaðum viðurskiftum, soleiðis at vit í felag finna eina góða loysn, tí tað hevur stóran týdning fyri okkum øll, at børn og ung trívast í Klaksvík.

*Keypmannahavn, 14. feb. 2002*

# 100 børn standa á bíðilista til fyrsta flokk i fólkaskúlanum í Havn!

**Thomas Arabo**



Ein slík yvirskrift hevði verið óhugsandi, tí eingin hevði góðtikið slíkt. Eitt fólkaskúlapláss er ein sjálvfylgja, og tað sama burdi eitt ansingarpláss verið.

Um kommunurnar ikki makta at skipa fyri nøktandi barnaansing, so er tað ein trupulleiki fyri arbeiðsmarknaðin og samfelagið, sum heild og gerst tað harvið ein landspolitiskur trupulleiki.

Á sama hátt, sum fólkaskúlapláss verða tilpassaði støddina av árgangum, so má tað sama gerast fyri barnaansing. Barnaansing er kostnaðarmikið fyri kommunurnar, men er hetta ein veruleiki, íð man má venja seg við nú bæði foreldur mugu arbeiða fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Raðfestingin má gerast øðrvísi og eiga boðini frá landi til kommunur at verða, at ansingargaranti má gevast til borgarnar innan eitt stutt áramál. Hetta mugu land og kommunur seta seg saman fyri at loysa í komandi tingsetu og um neyðugt má løggevast um hettar.

Málið má verða: Skúlar og barnaansing fyrst, og so kann man síggja, hvussu nógv verður eftir til ítrottarhallir, fótbóltstadion og annað.